ítróttur

Fótbóltur, 3. deild, menn:

HB vann – men flytir ikki upp

Vágamenn og GÍ loysa NSÍ og B68 av í 2. deild, meðan B71 og Æsir loysa TB og LÍF av í 3. deild

So fingu vit bilbukt við 3. deild eisini. Í fagrastu fótbóltslíkindum varð seinasta umfarið avgreitt leygardagin klokkan 13. Undan umfarinum stríddust HB, FS Vágar, GÍ og Skála um heiðursmerkini.

HB kundi ikki flyta upp, men teir vunnu deildina. Hetta saman við góðu endastøðuni í 2. deild og silvurplássinum í 1. deild undirstrikar, at HB framvegis er felagið við størstu breiddini í vaksnu deildunum.

Tað var stórur dagur í Vágum, tí næstbesta liðið hjá felagsliðnum fekk silvur og flytir eisini eina deild upp. GÍ tók annað uppflytingarplássið, tá teir tryggjaðu sær bronsukrónurnar. Skála hevði møguleikan, og hevði flutt upp, um teir vunnu í Fuglafirði, men tað gekk heilt øðrvísi. Vit ynskja HB tillukku við gullplássinum og FS Vágar og GÍ við ávikavíst og silvur og bronsu og uppflytingini.

Upp úr 4. deild koma B71 og Æsir úr Vestmanna. Sandoyingar eru stak væl nøgdir við, at næstbesta liðið hjá teimum flytir upp. Oftast spælir 3. deild á sama stað sum 1. deild, og tað ger at nytta fæst burtur úr eykaleikarunum, sum ikki koma inn í 1. deild. Vestmenningar vóru í 3. deild í fjør, men fóru sendandi niður aftur í 4. deild. Kanska teir nú hava fingið neyðugu royndirnar, so teir verða drúgvari í 3. deild hesaferð.

LÍF-FS Vágar 1-4 (1-2)

Tað var millum lítið og einki, sum fyrra umfarið bendi á, at tað vóru botnurin og uppflytaraevni, ið dystaðust. FS Vágar helt kanska, at uppgávan var avgreidd undan dystarbyrjan. Leirvíkingar mintu teir á, at tað skuldi spælast um stigini. Eftir væl spælt álop fekk Jonhard Høgnesen hol á, tá fimm minuttir vóru leiktir, og vóru teir í LÍF eitt sindur hepnir, so fingu teir okkurt mál afturat.

Rodmund Rasmussen var stóri maðurin, tá vágamenn komu fyri seg. Hann sleyt seg leysan og javnaði til 1-1, og dygst undan hvíldini skoraði hann eftir fríspæling í høgru.

Magnus Simonsen økti til 3-1, tá hann fylgdi skotroynd og høgalvbjarging, og Rodmund Rasmussen staðfesti sigur og uppflyting, tá hann stútaði frísparksinnlegg upp í handara hornið.



Sørin Petersen skjeyt síðsta málið í dystinum hjá KÍ móti GÍ í 3. deild *(Savnsmynd)*

B36-EB/Str. 3-5 (1-2)

Hetta mundi vera mest óvæntaða úrslitið hesa ferð. Men tað sást á øllum brøgdum, at teir í árstalsfelagnum, sum hava kappast um uppflyting alt kappingarárið, høvdu givið skarvin yvir undan dystinum. Miðskeiðis í fyrra umfarinum fekk Høgni Djurhuus hol á við brotssparki, sum varð dømt eftir at Dánial Magnussen var togaður niður.

Tíggju minuttir seinni javnaði heimaliðið, tá Magnus Hentze skallaði í málið, men bara tveir minuttir seinni var EB/Streymur aftur á odda. Hesa ferð var tað Ólavur Jacobsen, sum var púra leysur.

Seinna umfarið økti útiliðið skjótt. Sonni Samuelsen varð feldur í brotsteiginum, og hann útinnti sjálvur dómin úr ellivu metrum.

HAGTØL

Úrslit, 3. deild, menn:

LÍF-FS Vágar 1-4 (1-2)
1-0: Jonhard Høgnesen
1-1: Rodmund Rasmussen
1-2: Rodmund Rasmussen
1-3: Magnus Simonsen
1-4: Rodmund Rasmussen

B36-EB/Streymur 3-5 (1-2)
0-1: Høgni Djurhuus (br.)
1-1: Magnus Hentze
1-2: Ólavur Jacobsen
1-3: Sonni Samuelsen (br.)
2-3: Regin Arge
3-3: Hans Jákup Heinesen
3-4: Símun Pauli Dam
3-5: Høgni Djurhuus

ÍF-Skála 6-1 (3-0)
1-0: Jákup Baldvinsson (br.)
2-0: Jákup Baldvinsson
3-0: Eyðun á Lakjuni
4-0: Eyðun á Lakjuni
4-1: Hans Petur Jacobsen
5-1: Ólavur Ellingsgaard
6-1: Meinhardt Dalbúð

KÍ-GÍ 6-4 (1-2)
0-1: Tórálvur Jacobsen
0-2: Magni Jacobsen
1-2: sjálvmál
2-2: Olgar Danielsen
3-2: Sørin Petersen
4-2: Jan Bjartalíð
5-2: Andrass Jacobsen
5-3: Heri Petersen
5-4: Jan Skoradal
6-4: Sørin Petersen

TB-HB 2-4 (1-0)
1-0: Páll Nolsøe
2-0: Tórður Mortensen
2-1: Bjarni Mikkelsen
2-2: Bjarni Mikkelsen
2-3: Ólavur Midjord
2-4: Bjarni Mikkelsen

Støðan, 3. deild, menn:

HB	18	12	2	4	46- 29	26
FS Vágar	18	11	2	5	62- 28	24
GÍ	18	12	0	6	60- 35	24
Skála	18	10	2	6	54- 30	22
B36	18	9	3	6	45- 31	21
ÍF	18	9	1	8	48- 30	19
KÍ	18	7	4	7	54- 42	18
EB/Streymur	18	7	2	9	41- 50	16
TB	18	3	1	14	26- 69	7
LÍF	18	1	0	17	13-106	3

Málskjúttar, 3. deild, menn:

Rodmund Rasmussen	FS Vágar	24
Jóhannes Petersen	GÍ	18
Eyðun á Lakjuni	ÍF	15
Regin Arge	B36	13
Agnar Højgaard	Skála	13
Heini Heinason	GÍ	12
Jákup Baldvinsson	ÍF	12
Sørin Petersen	KÍ	12
Jóhan Lützen	KÍ	9
Jan Skoradal	GÍ	8
John Johansen	FS Vágar	7
Pauli Poulsen	Skála	7
Símun Pauli Dam	EB/Str.	7
Hans Dánjal Joensen	FS Vágar	6
Sigfriður Clementsen	HB	6
Arthur Johansen	Skála	6
Einar Petersen	TB	6
Høgni í Jákupsstovu	B36	5
Bergur Magnussen	EB/Str.	5
Hannus Olsen	FS Vágar	5
Magnus Simonsen	FS Vágar	5
Marner Olsen	LÍF	5
Rasmus Frederiksberg	Skála	5
Kajsten Rasmussen	Skála	5
Magnus Hentze	B36	4
Magni Mouritsen	B36	4
Ólavur Jacobsen	EB/Str.	4
Brian Jensen	EB/Str.	4
Tummas Joensen	EB/Str.	4
Allan Nielsen	FS Vágar	4
Jógvan Páll í Bartalsstovu	GÍ	4
Petur Páll Mikkelsen	GÍ	4
Heini Gaard	HB	4
Rani í Lið	HB	4
Páll Laksáfoss	ÍF	4
Svend Jacobsen	KÍ	4
Høgni Kastalag	KÍ	4
Hans Petur Jacobsen	Skála	4
Jan Guttesen	B36	3
Jákup W. Hansen	EB/Str.	3
Heri Petersen	GÍ	3
Oddbjørn Joensen	HB	3
Hans á Lag	HB	3
Jørgin Meitilberg	HB	3
Bjarni Mikkelsen	HB	3
Kristian Martin Skála	HB	3
Birgir Thomsen	ÍF	3
Petur Ove Ellingsgaard	KÍ	3
Egil Leivsgarð	KÍ	3
Jonhard Høgnesen	LÍF	3
Símun P. á Fríðriksmørk	Skála	3
Karl Øster	TB	3
Høgni á Borg	B36	2
Ólavur Debess	B36	2
Ronni Kjærbo	B36	2
John Thomsen	B36	2
Høgni Djurhuus	EB/Str.	2
Kaj Joensen	EB/Str.	2
Allan Kristensen	EB/Str.	2
Sonni Samuelsen	EB/Str.	2
Jonhard Joensen	FS Vágar	2
Torleif Johansen	FS Vágar	2
Torkil Nielsen	FS Vágar	2
Bjarni Prior	FS Vágar	2
Ronnie Hansen	GÍ	2
Bárður Heinason	GÍ	2
Magni Jacobsen	GÍ	2
Tórálvur Jacobsen	GÍ	2
Jákup Danielsen	HB	2
Heðin Lamhauge	HB	2
Mikkjal Thomassen	HB	2
Odd Eliassen	ÍF	2
Eyðálvur Petersen	ÍF	2
Kristian Petersen	ÍF	2
Olgar Danielsen	KÍ	2
Jóhan Havn	KÍ	2
Jógvan Jacobsen	KÍ	2
Jákup Oluf á Lakjuni	KÍ	2
Trúgvi Poulsen	KÍ	2
Jógvan Just Olsen	LÍF	2
Hjørleif Niclassen	Skála	2
James Olsen	Skála	2
Jón Tórður Holm	TB	2
Poul F. Joensen	TB	2
Tórður Mortensen	TB	2
Páll Nolsøe	TB	2
Niels Gunnar Petersen	TB	2

450 mál skotin í 3. deild í landskappingini í ár

Landskappingin í 3. deild hevur verið ein tann mest undirhaldandi í føroyskum fótbólti í ár – tilsamans eru 450 mál skotin tey 18 umførini.

Síðsta umfarið borðreiddi eisini við stak nógvum málum – ikki færri enn 36 mál í teimum fimm dystunum – og í meðal hava 25 mál verið skotin í hvørjum umfari. Tað er sera nógv.

Hinvegin kann tað eisini hava ávirkað, at tveimum av liðunum í 3. deild hevur gingist serliga illa. Hjá LÍF eru 106 mál farin inn, meðan TB-málverjin 69 ferðir noyddist at sækja boltin eftir bóltinum. Hjá hesum báðum liðunum er bólturin farin inn 40% av ferðunum, mál er komið í 3. deild…

Toppskjútti í 3. deild í ár gjørdist Rodmund Rasmussen við tilsamans 24 málum – tað vil siga, at hann í meðal í hvørjum dysti í landskappingini hevur skotið 1,3 mál. **hj.**